# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Falskar fortreytir fyri flogvølli

Í síðstu viku kom skriv frá forstjóranum í Vága Floghavn, har hann vísir á, hví tað er neyðugt at hækka flogerðslugjøldini: »Tey hava staðið í stað í átta ár«. Hann sigur eisini, at neyðugt er kunna fíggja viðlíkahald og íløgur og at tryggja, at eitt tíðarhóskandi gjald er fyri samfelagstæanstur, sum til dømis tilbúgving alt samdøgrið, alt árið.

Hetta er mikið áhugavert - serliga tá hugsað verður um tann sterka politiska vilja sum var til tess at fáa okkum flogvøllin á føroyskar hendur. Tað var tann 1. mai í 2007, at flogvøllurin varð yvirtikin frá dønum og skipaður sum landsstovnur. 24. juli árið eftir varð alt virksemið hjá Vága Floghavn lagt í partafelagið P/F Vága Floghavn.

Tað var Vinnumálaráðið, sum fyrireikaði yvirtøkuna av flogvøllinum. Raksturin skuldi sjálvandi ikki gerast dýrari. Flogvøllurin skuldi leingjast - við donskum pengum. Og alt tosið síðani um longdan flogvøll ber brá av, at fólk halda, at tess longri flogvøll vit fáa, tess bíligari verða flogferðaseðlarnir.

Veruleikin er kortini ein annar. Vága Floghavn hevur ein kunda - ein operatør, Atlantsflog, sum nú verður knokkroyttur við hækkandi gjøldum, sum frammanundan eru millum tey hægstu í Evropa. Hetta darvar sjálvandi allari menning hjá felagnum. Afturat hesum eru møguleikarnir at brúka flogvøllin skerdir við skerdum upplatingartíðum og dýrum eykagjøldum at nýta vøllin eftir vanliga arbeiðstíð. Veður má sær ráða, og tí slepst ikki undan úrtíðarflúgving í Føroyum.

Nýtslugjødini, Atlantsflog skal rinda Vága Floghavn, sum í 2008 vóru 18 milliónir, verða í 2010 hækkað upp í 32 milliónir krónur. Hetta er ein vøkstur upp á 14 milliónir krónur. Alt hetta eru trupulleikar, sum er skaptir eftir at flogvøllurin varð yvirtikin. Valla hevur hetta verið endamálið við yvirtøkuni, at flogvøllurin skuldi verða dýrari at reka - og at Atlatnsflog skuldi knokkroytast...

Fór Vinnumálaráðið skeivt í sínum metingum um kostnaðin av at reka flogvøll? Hava danir lumpað føroyingar, ella er tað bara dýrari at reka ein flogvøll á føroyskum enn á donskum?

Áhugavert hevði verið at fingið eina frágreiðing frá Vinnumálaráðnum um, hvat endamálið var við at taka yvir flogvøllin - og eina eftirmeting av, um arbeiði er gjørt nóg væl.

**Sosialurin**

## Bíða bara!

**SJÚRÐUR SKAALE**



Fólk fáa ikki alt tað, sum teimum er lovað. Men okkurt fáa tey!

Tað hevur verið tosað um fiskivinnureform. Hann verður helst av ongum.

Tað hevur verið tosað um kommunureform. Hann verður helst av ongum.

Og um fólkaskúlareform. Hann verður helst av ongum.

Og um miðnámsskúlareform. Hann verður helst av ongum.

Tað hevur verið tosað um ein reform, sum skal effektivisera tann almenna sektorin. Hann verður helst av ongum.

Tað hevur verið tosað um nýtt, tættari og betri samstarv við ES. Tað verður helst av ongum.

Tað hevur verið tosað um olympiskan limaskap. Hann verður helst av ongum.

Og um skattareform. Hann verður helst av ongum.

Og um orkupolitiskan reform. Hann verður helst av ongum.

Hugskot og tankar tróta ikki. Men sum gjáarfundurin gjørdi so pínliga greitt: samgongan hevur so veika leiðslu, at hon megnar einki at fremja.

Fáa fólk so einki fyri atkvøðurnar og allar pengarnar, sum tey mugu stoyta niður í politisku skipanina?

Megnar skipanin ikki at gera nakað sum helst?

Á jú!

Bíða bara!

Vit venda aftur til fleiri valdømi!!!

## Tað almenna og heilsan

**ANNIKA BORGARLÍÐ**
sjúkrarøktarfrøðislesandi

Vit hava valt at seta fokus á rørslu og heilsu síðstu árini. Ár 2009 valdu vit at kalla rørsluár. Politiskt sæð var tað almenna við til at leggja lunnar undir, at fáa føroyingar at hugsa um heilsuna, stilla bilin og nýta beinini meira ella súkkla, tá vit fara til arbeiðis.

Hesum viðvíkjandi undrar tað meg, hví einki verður til meira enn tos og annars upp til tann einstaka borgaran at finna sær eitt stað, ella ein veg, at renna eftir. Nú er Tórsbreyt í Havn, men tað er langt at fara fyri mong. Tað, sum eg hugsi her er, hví sær landið og kommunurnar ikki møguleikan í at gera renni/súkklubreyt fram við vegnum, tá Landsverk, hóast alt, altíð er í gongd við ymist arbeiði á vegastrekkjum millum býggja. Eg havi sæð mangan súkklara og rennara úti á alfaravegi frá morgni til kvølds. Hetta er ikki ófarligt. Nógvir bilførarar yvirhála uttan at ansa eftir, at møguligur súkklari ella rennari er á staðnum. Eisini er tað ræðandi og ótespiligt, tá stórir trailarir og lastbilar koyra framvið við rúkandi ferð, soleiðis, at alt, sum vigar undir 100 kg, næstan verður hálað út á vegin í forbífartinum.

Møguligt fokus kemur nokk ikki fyrr enn vanlukkan er hend, ella hvat?

Tá politikarar og tað almenna faktist purra upp undir, at fólk skulu røra seg meira, áttu hesi fólk og stovnar eisini at gjørt nakað ítøkiligt fyri at fremja hetta. Eisini eru vit so errin av, at føroyingar luttaka í kappingum í okkara grannalondum og øðrum londum, fyri ikki at gloyma altjóðakappingum. Vit hava sæð seinastu árini, at tað hóast alt eru einstaklingarnir, sum veruliga kappast í altjóða kappingum, og ikki bert ev við fyri at læra. Hví er tað so ikki upplagt at royna at skapa betri umstøður millum býggja, soleiðis, at okkara rennarar og súkklarar ikki noyðast út á vegin at renna, og har við seta lív og heilsu í vága.

## FSF-forsetavalið

**HANS J. HERMANSEN**



Var ikki sørt bilsin, tá tað fréttist, at mítt egna felag B 36 er millum tey 9 feløgini, ið vilja hava sitandi FSF-forsetan skiftan út á komandi aðalfundi. Havi hoyrt meg fyri hjá øðrum í B 36, og tykjast tey øll vera eins bilsin.

FSF hevur verið í tungum sjógvi seinastu árini. Nú er neyðugt at geva nevndini frið at virka, fyri at FSF skal kunna virka føroyskum fótbólti at frama. Ófriður um fótbóltssambandið er tað ringasta, ið kann henda. Men kanska veit nevndin fyri B 36 eitt og hvørt, ið kann greiða okkum frá, hví hon ger, sum hon ger. Kundi eisini hugsað mær at vitað, hví hini feløgini, sum ganga saman við B 36 um formansvalið, hava tikið ta avgerðina.

Fyri tveimum árum síðan var tað júst B 36, ið tók undir at stilla sitandi FSF-forsetan upp. Loyvi mær tí at spyrja formannin fyri B 36, Kristian á Neystabø:

1. Hvat hevur sitandi FSF-forsetin gjørt, síðan hann skal skiftast út?
2. Er nevndin fyri B 36 samd um, at so skal vera?
3. Var hetta tikið upp á seinasta aðalfundi í B 36 og gjørt fundarluttakarunum greitt?
4. Var fundurin samdur um at skifta hann út?

Hetta skal ikki á nakran hátt skiljast sum nøkur atfinning at mótvalevni til FSF-forsetan.

Fundurin verður komandi vikuskiftið. Vænti tí at fáa svarað spurningum mínum í hesari vikuni.

Virðingarmest, við ítróttarkvøðu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.